**(Uppskot til)**

# Kunngerð

**um**

**viðurlag fyri framsýning**

Við heimild í § 19, stk. 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2013 um upphavsrætt, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Tá ið listaverk verður sýnt fram, hevur upphavsmaður rætt til viðurlag.

**§ 2.** Hann, ið skipar fyri framsýningini, skal rinda viðurlag til upphavsmenn.

**§ 3.** Rætt til viðurlag hava livandi listafólk, listhandverkarar og sniðgevar, ið virka í Føroyum.
*Stk. 2.* Eftir kunngerðini kann viðurlag bert veitast fyri egin verk, ið ikki eru avhend.
*Stk. 3.* Viðurlag verður ikki veitt fyri framsýningar í sambandi við kappingar, útboð v.m., uttan so at framsýningin varir longri, enn neyðugt er.

*Útrokning og avrokning av viðurlagi*

**§ 4.** Avroknað verður við felagsskap, sum umboðar upphavsmannin sambært § 40 í løgtingslóg um upphavsrætt.
*Stk. 2.* Tann í stk. 1 nevndi felagsskapurin avroknar við upphavsmenn.
*Stk. 3.* Mentamálaráðið ger avtalu við felagsskap, sum umboðar upphavsmenn sambært § 40 í løgtingslóg um upphavsrætt, um hvussu viðurlagið skal roknast.
*Stk. 4.* Um annað ikki er avtalað, er framsýningin at meta sum varandi frá tí at upphavsmaðurin avhendir verkið, til tað aftur er í varðveistlu hjá upphavsmanninum. Tann mánaðin, har framsýningin byrjar verður roknaður sum heilur mánaði.
*Stk. 5.* Er eingin avtala um flutning, rindar fyriskiparin fyri flutningin.
*Stk. 6.* Verður eitt verk selt á framsýningini, skal rindast fyri alla framsýningartíðina, uttan so at verkið verður avhent til keyparan, áðrenn framsýningin er liðug.
*Stk. 7.* Tað er fyriskiparin, sum hevur ábyrgdina fyri at kunna felagsskapin um rætta talið av verkum, umframt hvør er upphavsmaður til tey framsýndu verkini.

*Gjald*

**§ 5.** Viðurlagið verður avroknað við felagsskapin í seinasta lagi ein mánað eftir seinasta framsýningardag.
*Stk. 2.* Er talan um framsýning, ið varir langa tíð, verður avroknað hálvárliga, um ikki annað er avtalað.
*Stk. 3.* Goldið verður til upphavsmann, ið hevur skapt og eigur verkið. Hava fleiri verið við til at skapa verkið, uttan at teirra íkast hvør sær kann metast sum sjálvstøðugt verk, verður viðurlagið býtt javnt millum teirra.

*Trygging*

**§ 6.** Er ikki annað avtalað, eigur fyriskiparin at tryggja verkini á framsýningini. Tryggingin skal eisini fevna um stuldur, annan skaða á verkið og flutning til og frá framsýningarstaðnum.
*Stk. 2.* Fellur ábyrgdin hjá tryggingarfelagi burtur vegna vantandi trygging, eftirlit á framsýningarstaðnum ella innpakking undir flutningi frá framsýningini, má fyriskiparin sjálvur rinda endurgjaldið.
*Stk. 3.* Um fyriskiparin ikki átekur sær at tryggja nøkur av framsýndu verkunum (t.d. tí trupult kann vera at tryggja onkran lutir), skal hann gera vart við hetta í góðari tíð.

*Satsir*

**§ 7.** Upphæddirnar verða prístalsjavnaðar annaðhvørt ár.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Tórshavn, XX.XX.2013

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Lógarteksturin:**

*Viðurlag fyri framsýning*

**§ 19.** Tá ið eitt verk er útgivið, ella tá eitt eintak av myndlistaverki er handað til ognar, kann eigarin, uttan so at annað verður avtalað, lata eintakið úr hondum at vísa alment.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um framsýningarviðurlag til upphavsmenn, tá ið teirra listaverk verða sýnd fram alment.